# Landsgrannskoðanin
## søkir eftir starvsfólki

Í sambandi við at ein av okkara grannskoðarum er farin úr starvi, verður søkt eftir starvsfólki at byrja 1. september 2009 ella eftir avtalu. Arbeiðið á stovninum er áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt og fevnir um at grannskoða almennar stovnar og skipanir.

**Førleikakrøv:**
Hægri útbúgving innan grannskoðan ella roknskap o.l., ella royndir innan almenna /privata umsiting eru avgjørt fyrimunir, men ikki treytir.

Vit leggja dent á, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er arbeiðssamur, nærlagdur, dugir væl at skriva og samskifta við stovnar og starvsfelagar.

**Útbúgvingarmøguleikar:**
Á Landsgrannskoðanini bjóða vit starvsfólki okkara útbúgving og eftirútbúgving. Vit samstarva við norðurlendsku ríkisgrannskoðanirnar, og í tí sambandinum stendur starvsfólkum í boði at fara á skeið ella at arbeiða styttri tíðarskeið í hinum norðurlondunum.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum o.ø. skal sendast til:

*Landsgrannskoðanina*
*Traðagøta 43*
*Postrúm 2053*
*165 Argir*
*ella sum teldupostur: postur@lg.fo.*

Umsóknir skulu vera Landsgrannskoðanini í hendi í seinasta lagi 29. juni 2009. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Beintu Dam á telefon 355100. Fyrispurningar verða viðgjørdir í trúnaði.

Tú kanst fáa meira at vita um Landsgrannskoðanina á heimasíðu okkara: www.lg.fo.

LANDSGRANNSKOÐANIN er ein óheftur stovnur undir Løgtinginum, sum virkar sambært Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." er skrivari hjá løgtingsgrannskoðarunum, og tí fyrireikar og avgreiðir Landsgrannskoðanin mál vegna løgtingsgrannskoðararnar , sum m.a. gjøgnumganga og leggja almennar roknskapir fyri Løgtingið at góðkenna.

FØROYA HANDILSSKÚLI



FØROYA HANDILSSKÚLI

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 31 71 77
Telefax 31 33 74
www.fh.fo

## Teldustøðingar

Nýggjur flokkur av teldustøðingum byrjar í september 2009.

Teldustøðingaútbúgvingin (TSÚ) er styttri framhaldsútbúgving, ið tekur 2½ ár. Útbúgvingin fevnir um fýra høvuðsøki: forritan, systemmenning, tøkni og virki.
Á TSÚ gert tú fleiri spennandi verkætlanir.

Eftir lokna útbúgving eru góðir møguleikar fyri starvi innan KT ella fyri framhaldandi lestri innan KT á bachelorstigi.

Umsóknarfreistin er 15. juni 2009.

Kunning um útbúgving og upptøku fæst á síðunum www.tsu.fo og www.fh.fo ella við at venda sær til Føroya Handilsskúla á tlf. 317177.

SENDISTOVAN



Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo

SKÁLA 1965

# Skrá fyri Fjarðastevnuna 2009

**Fríggjadagin 12. juni**

Kl.: 17.00 Fótbóltur: yngst Skála – NSÍ
smápiltar Skála á – xxx
18.00 Brotssparkskapping fyri børn, fødd 1994-98 og 1999 og seinni.
19.00 Fótbóltur: 3. deild Skála – NSÍ b
19.00 Grand prix renning
19.00 Sang-Brak verður í Meinigheidshúsinum.
20.00 PLAY-station FIFA 2009 kapping í høllini.

**Leygardagin 13. juni**

Kl.: 09.00 Fótbóltur kappingar:
9.00 pinkur: Skála – AB – B 68 – KÍ b
10.15 gentur 10-12 ár FM: Skála – B68 a – KÍ a – MB
11.30 piltar: Skála b – B68 – KÍ b – SÍF b
12.45 piltar FM: Skála a – NSÍ a – HB a – SÍF
13.00 smápiltar: Skála b – B68 c – TB b – Royn
09-12.00 Tivoli opnar á ítróttarøkinum.
13.00 Skrúðgongan við Skálafjarðar Hornorkestri fer frá skúlanum og inn á kappróðrarøkið, har Magnus Rasmussen, borgmeistar setur stevnuna.
14.30 Tivoli opnar á róðrarøkinum. Opið meðan róðurin er.
15.00 FM Kappróður
15 – 18.00 Myndaframsýning í skúlanum.
17.00 Fótbóltur: 1. deild menn Skála – VB/Sumba
18.00 Tivoli opnar á ítróttarøkinum.
18.00 Stór køkuframsýning og kapping.
18.00 Grillin til tað stóra grillkvøldið verður tendra.
19.00 Felagið fyri rørslutarna SVANUR spælir boccia.
19.00 Brotssparkskapping fyri vaksin
19.30 Stóra grillkvøldið á ítróttarøkinum við:
Útimøti. KELDAN luttekur.
Felagssangur, lokalir tónleikarar
Løgtingsmaðurin Torbjørn Jacobsen heldur røðu.
23.00 Harmonikudansur í høllini v/ Juel Høgnesen og vinmenn spæla.

**Sunnudagin 14. juni**

Kl.: 11.00 Guðstænasta í Skála kirkju við Henning Bøgesvang presti.
13.00 Fótbóltur: 1. deild kvinnur Skála – KÍ
14.00 Tivoli opnar á ítróttarøkinum.
15 – 18.00 Myndaframsýning í skúlanum.
15.00 SVANUR
15.00 Stórt barnatiltak í høllini við sjónleiki, sangi og rørslum.
17.00 Talentkapping í høllini. Gestaluttakari: Faroe 5

Steyp og heiðursmerkir til fótbóltin eru givin av Arbeiðarafelagnum Lýsing.

Meira upplýsing um hvørt einstakt tiltak finst á heimasíðunum hjá Skála: www.skalaif.fo og hjá kunnigarstovuni í Runavík www.visiteysturoy.fo.

Innlendismálaráðið

# Avloysarastarv í Innlendismálaráðnum

Eitt starv sum avloysari fyri løgfrøðing í barnsburðarfarloyvi er leyst at søkja.

Umsøknir skulu verða ráðnum í hendi í seinasta lagi 23. juni 2009.

Meira fæst at vita um starvið á heimasíðuni hjá Innlendismálaráðnum www.imr.fo